SKÁLA ÍTRÓTTARFELAG
FO-480 Skáli
Tlf. 441574 / Fax 441574

STOVNAÐ:
13.05.1892

FORMAÐUR:
Kurt Rasmussen

MEISTARAR:
Ongantíð
Besta úrslit nr. 8 í 1. deild

STEYPAVINNARAR:
Ongantíð

GREIPUVINNARAR:
Ongantíð

Í 1. DEILD (3 ÁR):
2002-

Í EUROPA:
Ongantíð

# Skála er á rættari kós

**Hesa ferð halda teir seg hava verið beinraknir, tá ið teir á Skála hava verið uttanlands og funnið stuðulsspælarar at hjálpa sær at sleppa undan aftasta plássinum, sum teir vóru á alt kappingarárið í fjør – uttan eftir síðsta umfarið!**

**Jóannes Hansen**
*joannes@sosialurin.fo*


*Sveinur Justinussen er stuðulsspælari hjá Skála*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Skála er partur av bestu deildini. Tað hava teir verið tvey tey seinastu árini. Tølini siga, hvør leikluturin hjá teimum hevur verið. Bæði í fjør og í fyrraárið var Skála mest sum alla tíðina á tíggjunda plássinum. Báðu ferðirnar megnaðu teir í evstu løtu við rimmar endaspurtum at lyfta sær so mikið, at atgongumerkið til bestu deildina varð tryggjað eitt ár afturat.

Í fyrireikingunum til nýggja kappingarárið hava teir mett, at tað hevur gingið rætta vegin. Spælið er vorðið betri, enn tað hevur verið undanfarnu árini, og tað er meiri kapping um plássini á liðnum, enn tað hevur verið. Hvat spælarum viðvíkur hevur talan verið um ávísa frágongd. Men talan hevur ikki verið um spælarar, sum hava verið millum stuðulsspælararnar.

Í fjør vóru 26 spælarar á besta liðnum. Sjey teirra vóru bara við í einum ella tveimum dystum. Av hesum eru tað bara tveir, sum aftur í ár venja við besta liðnum. Av føstu monnunum í fjør er Alexander Jovevic fluttur til NSÍ, og Agnar Højgaard, sum spældi nógv undan summarsteðginum, er givin. Sveinur Justinussen, sum var eyðsýndur miðvallari, inntil fótskaði oyðilegði fyri hann og Skála, hevur ikki verið vant. Men teir vóna, at hann fer at finna fótbóltsskógvarnar fram, nú hondbóltsárið er liðugt.

Tveir nýggir Skála spælarar eru við í kappingini um plássini. Teir eru álopsspælarin Malmberg Olsen og so Jóhannes Mikkelsen, sum er miðvallari og sonur Asbjørn Mikkelsen, sum í næstan ein mansaldur var millum berandi kreftirnar í fótbóltinum á Skála.

Á Skála hava teir í fleiri ár havt útlendingar at hjálpa sær. Onkra ferðina hava teir ikki verið so hepnir, tí spælararnir hava víst seg ikki at vera so mikið góðir, at teir hava verið sjálvsagdir á liðnum.

Frá í fjør av eru miðverjin Dusan Jaic og vongspælarin í vinstru, Iulian Florescu, framvegis á liðnum. Harafturat hava teir verið uttanlands og fingið fatur á trimum nýggjum spælarum, og í hvussu so er, tá ið talan er um útispælararnar, so halda teir seg hava verið hepnir á fjarleiðum. Nenad, sum Dusan Jaic hevur verið millummaður fyri í Serbia, og sum hevur spælt í næstbestu deildini í heimlandinum, sigst vera sera hollur miðvallari, og Eugen Stanciu, sum Iulian Florescu hevur fingið samband við í Rumenia, og sum hevur spælt í 2. og 3. deild í Rumenia, kann gerast hjálpin at fáa størri úrtøku burturúr.

At gera mál var stóri trupulleikin hjá Skála í fjør. Í ellivu av átjan landskappingardystum fóru skálamenn av vøllinum, uttan at tað hevði eydnast teimum at fáa mál. Í fleiri av hesum dystunum hevði Skála fleiri upplagdar málmøguleikar, sum teir misnýttu. Eitt nú í útidystinum í fyrsta umfarinum, sum var í Runavík (0-2), og í heimadystunum ímóti B68 (0-1) og KÍ (0-2) vóru skálamenn ikki neyvir frammanfyri mótstøðumálinum.

Í trimum dystum megnaði Skála at gera meiri enn eitt mál. Tvær ferðir var tað ímóti niðurflytarunum úr FS Vágum (4-1 heima og 4-3 á útivølli) og í síðsta umfarinu, tá ið Skála á heimavølli vann 3-2 á EB/Streymi og við tí sigrinum fyri fyrstu ferð í teimum átjan umførunum lyftu sær burtur av aftasta plássinum.

Verjuparturin líkist sær sjálvum, tá ið sammett verður við í fjør. Eitt sindur av iva er um, hvør fer at verja málið. Eugen Voda var fyri tað mesta málverji í fjør. 40 ára gamli málverjin hevur í ár fyri tað mesta verið málmansvenjari. Igor Bjarni Kostic er komin úr Íslandi at royna seg. Í fjør var hann eykamálverji hjá ÍBV í Vestmannaoyggjunum. Í kappingini um løgmanssteypið hevur hann fingið dygga kapping frá Heina Kristiansen, sum 10. mars fylti 18 ár.

Hesa ferð ætla teir á Skála ikki so at siga at eiga patent upp á aftasta plássið og harvið í hvørjum einasta dysti at hava trýstið av hóttandi niðurflytingini hangandi yvir sær. Manningin verður mett at vera kanska eitt sindur betri, enn hon var í fjør. Johan Nielsen, sum er mest royndi og mest vinnandi venjarin í landinum, heldur framvegis umstýrisvølin, og í venjingardystunum hava spælið og úrslitini bent á, at Skála ikki alla tíðina nýtist at vera botnproppur.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Igor Bjarni Kostic (ÍSL) | | | ÍBV |
| Heini Kristiansen | 4/-14 (0–0) | | |
| Eugen Voda (RUM) | 14/-25(2–0) | | |
| **Verja** | | | |
| Dusan Jaic (JUG) | 17/0 (3–0) | | |
| Arnhold Berg | 13/1 (5–1) | | |
| Rói Jacobsen | 8/0 (0–0) | | |
| Ronni Hansen | 8/0 (0–0) | | |
| Iulian Florescu (RUM) | 13/2 (5–1) | | B71, B36 |
| **Miðvøllur** | | | |
| Bárður Danielsen | 7/1 (0–0) | | |
| Sveinur Justinussen | 11/1 (0–0) | | |
| Hanus Thorleifsson | 18/1 (2–0) | | |
| Bogi Gregersen | 16/3 (5–0) | | |
| Pauli G. Hansen | 16/1 (2–0) | | |
| Nenad Stankovic (SER) | | | |
| Jóhannes Mikkelsen | | | |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| Teitur R. Joensen | 1/0 (0–0) | | |
| **Álop** | | | |
| Jónhard Frederiksberg | 18/2 (0–0) | | |
| Tróndur Poulsen | 1/0 (0–0) | | |
| Malmberg Olsen | | | |
| Eugen Stanciu (RUM) | | | |
| **Tilgongd** | | | |
| Eugen Stanciu (RUM) | | | Rumenia |
| Nenad Stankovic (SER) | | | Serbia |
| Igor Bjarni Kostic (ÍSL) | | | Ísland |
| Jóhannes Mikkelsen | | | Fluttur upp |
| Malmberg Olsen | | | Fluttir upp |
| **Frágongd** | | | |
| Aleksandar Jovevic (JUG) | | | NSÍ |
| **Venjari** | | | |
| Johan Nielsen | | | |



# Alexandur er alt árið í fremstu røð

**Ábyrgdarkenslan fyri at vera við til at halda ítróttinum í lokalsamfelagnum í fremstu røð ber við sær, at tað á vestara arminum av Skálafjørðinum framvegis eru ítróttarmenn, sum eru millum berandi kreftirnar bæði í hondbóltinum og fótbóltinum**

**Jóannes Hansen**
*joannes@sosialurin.fo*

Tað var vanligt inntil fyri ikki so nógvum árum síðani. Somu spælarar vóru millum lyklaspælararnar í fleiri ítróttargreinum. Ofta var sami maður fótbóltsspælari, hondbóltsspælari og flogbóltsspælari í fremstu røð og kanska eisini í øðrum ítróttargreinum.

Á Skála og Strondum eru felagsliðini við í fremstu røð í hondbólti og fótbólti, og lokalsamfelagið tekur væl undir við liðunum. Tað sæst á áskoðarafjøldini bæði á heimavølli og útivølli.

Hóast tepra fólkagrundarlagið ber tað til. Onkrir vilja leggja rygg til so at siga allar tólv mánaðirnar. Teir hava verið fleiri, men Skála liðið higartil í ár bendir á, at tað eru tveir, sum hava stríðst fyri at vinna hondbóltinum heiðurskrónur og nú spæla fyri Skála. Teir eru Pauli G. Hansen og Alexandur Johansen. Í fjør var Sveinur Justinussen á Skála miðvøllinum. Teir hava ikki mist mótið um, at hann fer at vísa seg, nú hondbóltsárið er av. Teir halda seg hava brúk fyri honum.

## Arbeiði, bilur og ítróttur

7. juni verður hann 25 ár. Tað er eingin aldur, men longu nú hevur Alexandur Johansen leingi verið við til at mynda hondbóltin og fótbóltin á Skála og Strondum.

Ítróttarmaðurin ásannar, at tíðin er avmarkað.

– Eg arbeiði í Føroya Sparikassa í Havnini. Tíggju tímar um vikuna fara í ferðing til og frá arbeiði. Í fótbóltinum venja vit fimm ferðir um vikuna, umframt at vit spæla dystir. Í hondbóltinum venja vit tríggjar ferðir um vikuna, umframt at vit hvørja viku spæla dystir. Hesa ársins tíðina venji og spæli eg tíggju ferðir um vikuna.

*Ber tað til?*

– Um heimafronturin ikki var áhugaður og fylgdi væl við, so hevði tað als ikki borið til. Onkuntíð eru praktiskir trupulleikar, tí venjingar og dystir í hondbóltinum og fótbóltinum eru í senn. Men vit royna at laga okkum eftir hvørjum øðrum, og hinir kenna umstøðurnar. Í fyrsta umfarinum í kappingini um løgmanssteypið spældi Skála á útivølli ímóti VB. Sama leygardagin spældi StÍF landskappingardyst á heimavølli ímóti H71. Pauli G. Hansen og eg spældu hondbólt og kundu tískil ikki vera við í Suðuroy. Men so fekk onkur annar møguleika at vísa, at teir eru góð evni til pláss á besta fótbóltsliðnum.

*Orkar tú at vera á toppinum alt árið?*

– Vit fara undir fótbóltsvenjingina í januar, tá ið tað ikki altíð er so hugaligt at venja uttandura. Í hondbóltinum økist spenningurin fram ímóti kappingarenda, og tá ið tað aftur verður farið undir hondbóltsárið, hava vit á Skála havt hóttanina av niðurflytingini at hugsa um. Tað er ein stór avbjóðing, men eg kann ikki siga meg undan, at tað viðhvørt kennist eitt sindur óhugaligt og súrt at fara til venjingar.

*Hví tekur tú so ikki annað fram um hitt?*

– Tað havi eg ikki enn kent nakra trongd at gera. Um trongdin kemur, fer tíðin at vísa. Men tað hevur eisini nakað við ábyrgdina at gera. Vit eru ikki so nógv, og vit, sum eru við til at bera bæði hondbóltinum og fótbóltinum, vita, at um vit kasta aðra ella hina ítróttargreinina frá okkum, so verður eitt hol, sum tað ikki uttan víðari fer at bera til at fylla. Soleiðis er tað bara. Hetta skal ikki takast sum reyp, og at eg haldi, at tað ikki ber til at klára seg uttan meg og hinar, sum eru við á báðum frontunum. Men lokalsamfelagið er ikki stórt, og tann, sum býr og livir á bygd, veit, hvussu viðurskiftini og umstøðurnar eru. So nógv tíð fer eisini komandi árini at vera nýtt á arbeiðsplássinum, í bilinum og til venjingar og dystir, og sum heild dámar mær sera væl at spæla fótbólt og hondbólt.

**Metingin**

Skála hevur seinastu tvey árini bjargað sær undan niðurflyting í seinastu løtu, og uppgávan hjá teimum appelsinlittu verður ivaleyst aftur í ár at stríðast fyri lívinum í bestu deildini

## Tað verður hugaligari

Tá ið vit tosa um avrikini á fótbóltsvøllinum, so roknar Alexandur Johansen við, at tað fer at ganga betri hjá Skála í ár, enn tað hevur gjørt tey bæði fyrstu árini í bestu deildini.

– Tað er strevið altíð at hava bakið ímóti múrinum. Tá er skjótt at koma í ónda ringrás. Vit hava misnýtt møguleikar og tapt tepurt. Tað hevur við sær, at tú kennir teg strongdan. Harvið hugsar tú nógv um at gera tingini betri, og tá roynist tað sjáldan nakað serligt. Tá ið tað gongst væl, og sjálvsálitið er stórt, so gongur alt av sær sjálvum. Mekanikkurin stýrir, og tingini eydnast.

*Verður nýggja kappingarárið meiri hugaligt, enn tey bæði fyrstu í bestu deildini hava verið?*

– Í fjør og í fyrraárið hava vit ikki havt nóg stóra álopstyngd. Vit hava dúva uppá, at tað hevur skula eydnast at stinga bóltin fram ímillum til Jónhard Frederiksberg. Vit rokna sjálvir við, at tað fer at verða øðrvísi í ár. Johan Nielsen hevur arbeitt meiri við at økja um fótbóltsfatanina hjá okkum, enn nakar annar venjari hjá okkum hevur gjørt. At hetta hevur týdning, veit eg frá hondbóltinum. Tá ið vit vóru smádreingir, høvdu vit danskar hondbóltsvenjarar, sum lærdu okkum at skilja hondbóltsspælið. Tað hevur havt týdning fyri avrikini hjá StÍF seinastu árini.


*Alexandur Johansen spælir bæði 1. deildar hondbólt og fótbólt*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

*Hvat er betri hjá tykkum nú, enn tað hevur verið?*

– Tað fáa vit at síggja, tá ið tað gerst álvari í landskappingini. Vit hava arbeitt nógv við flytingum. Vit hava størri sjálvsálit nú, enn vit hava havt undanfarnu árini. Tað sæst aftur í, at spælararnir bjóða seg meiri til, at teir tora at halda upp á bóltin, og at teir duga betri at skyna á, nær teir skulu sleppa sær av við bóltin. At vit hava fingið ein góðan útlendskan miðvallarspælara og ein álopsspælara, sum vit rokna við fer at verða góð hjálp hjá Jónhardi har frammi, vóna vit fer at hava við sær, at vit kunnu flyta spælið hjá okkum longri fram, og at vit í ár fara at fáa størri úrtøku, enn vit higartil hava megnað.

*So Skála fer ikki støðugt at vera niðanfyri strikuna?*

– Undanfarnu árini hevur tað verið týdningarmikið, at vit ikki hava verið har eftir kappingarenda. Vit vóna eitt betri úrslit. Um tað fer at eydnast, valdast nógv um, hvussu tað fer at gangast í fyrstu umførunum. Fer tað at gangast væl, og stuðlað verður undir sjálvsálitið, so haldi eg, at vit hava grundarlag at vinna fleiri stig, enn vit higartil hava megnað, heldur Alexandur Johansen, sum nú hondbóltsárið er liðugt, hevur eitt sindur minni at hugsa um, enn hann hevur havt fyrsta fjórðingsárið. Men honum nýtist heilt víst ikki at keða seg!